# Vilja sleppa at gera alistøð í Mykinesi

**– Ein alistøð hevði givið nøkur føst arbeiðspláss og tað hevði verið gull vert fyri eina útoyggj sum Mykines, sigur ein av stigtakarunum, Esbern í Eyðansstovu**

BYGDAMENNING
*Áki Bertholdsen*



*Gongur, sum Esbern í Eyðansstovu, og aðrir vilja, kemur ykines upp í alivinnuna nú. Teir hava søkt um loyvi at gera smoltstøð í oynni. Teir halda, at tað er ein upplagdur møguleiki at skapa vinnulíí oynni og nógv eru til reiðar at seta pening í ætlanina.*

*Mynd: Bárður Eklund Johannesen*

Gongur, sum ætlað, verður ein alisstøð nú sett á stovn í Mykinesi.

Tað er Esbern í Eyðansstovu í Mykinesi og tveir aðrir, sum nú hava tikið stig til at gera eina alistøð í Mykinesi.

Hann sigur, at tað, sum ætlanin er, er at fara undir at ala smolt á eini støð í Mykinesi

Hann sigur, at tað eru einir tveir mánaðir síðani, at teir søktu vinnumálastýrið um loyvi at gera eina smoltstøð í Mykinesi, men enn er svar ikki komið.

Tað kann tykjast at liggja eitt sindur fjarskotið at byggja eina smoltstøð í Mykinesi, men tað er Esbern í Eyðansstovu als ikki samdur í

– Tað liggur akkurát líka væl fyri at ala smolt í Mykinesi sum alla aðrastaðni í Føroyum,

Hann sigur, at teir hava verið í sambandi við fólk í alivinnuni og tey halda tvørturímóti, at ein smoltstøð er ein upplagdur møguleiki til at fáa okkurt slag av vinnulívi á føtur í eini útoyggj, sum Mykines er.

– Teir hava sagt okkum, at tað er onki at bíða við og at tey vóna, at vit koma ígongd, ongantíð ov skjótt.

Stigtakarin í Mykinesi sigur, at, tað, hann hevur fingið at vita, er ov lítið til av smolti til og tí vónar hann, at teir sleppa ígongd í Mykinesi sum skjótast.

Hann sigur, at tað, teir hava søkt um, er at fáa loyvi til at ala 500.000 smolt um árið í fyrstu syftu.

– Tað er ikki tað stóra, men tað hevði verið ein góð byrjan. Men ætlanin er avgjørt at fáa møæguleikan at økja um virksemið, so hvørt, sum umstøðurnar eru til tað.

## Ongin trupulleiki

Esbern í Eyðansstovu er sannførdur um, at flutningurin verður als ongin trupulleiki, tá ið smolti skal fáast úr Mykinesi í tey alibrúkini, sum keypa.

Hann vísir á, at yvirhøvur verða smoltini nú á døgum flutt við tyrlu og tað liggur ikki verri fyri at flyta tey úr Mykinesi í okkurt alibrúk, sum at flyta tey onkra aðrastaðni frá.

Hann vísir eisini á, at eitt stórt alibrúk liggur beint við, á Sørvágsfirði, so enda smoltini har, er flutningurin ikki langur.

Hann sigur, at nóg mikið av vatni er í Mykinesi til smoltstøð.

– Nú ber tað eisini til at seta skipanir upp, so at vatnið kann endurnýtast og tá verður í øllum førum slett ongin trupulleiki við vatninum. Tá fer eisini at bera til at hava nógv meiri smolt tað hálvu milliónina, teir ætla at byrja við.

## Til reiðar við pengum

Esbern í Eyðansstovu sigur, at ætlanin er ikki at leggja ov nógv fyri beinanvegin. Umframt at byrja í smáum við 500.000 smoltum, er ikki ætlanin at byggja nakran virkisbyging - í hvussu so ikki í fyrstu syftu.

– Vit ætla at ala úti, tí tað ber væl til at ala smolt úti. Men møguliga fara vit at gera møguleikar fyri at hava tey inni tað allarfystu tíðina, men tað er ikki neyðugt við nakrari stórari íløgu til tað. Tað ber væl til at hava tey í kørum í onkrum kjallara, sigur hann.

Hann viðgongur tó, at smoltini veksa heldur betri undir taki, tí tá ber til at hava eitt sindur av hita á og sleppa teir ígongd, fara teir tí helst at byggja virkisbygning, tá ið ráðini verða til tað.

Stigtakarin sigur, at teir hava eisini verið í sambandi við fólk, sum eru sinnað at seta pening í ætlanina.

Millum annað eru tað alibrúk, sum eru áhugað at seta pening í ætlanina.

Hann væntar tí ikki, at tað verður nakar trupulleiki at úvega pening til ætlanina.

Hann metir, at talan verður um eina íløgu upp á upp ímóti tveimum milliónum.

Men hann ivast ikki í, at framtíð er í hesum, serliga, tá ið hugsað verður um, at alivinnan er í støðugari menning tí tí alsamt eisini hevur brúk fyri meiri og meiri smolti.

## Gjørt undurverk

Mykinesmaðurin sigur, at Smoltstøðin hevði givið arbeiði til einar tríggjar mans.

– Tað hevði verið trý føst arbeiðspláss og tað hevði verið gull vert í einum plássi sum Mykinesi.

Hann sigur, at tað eru júst nøkur føst arbeiðspláss, sum sum eru nakrar av høvuðsfortreytunum fyri smáplássini, skulu tey hórað undan.

Tað kann eisini vísast á, at nettupp smoltstøðir er ein vinnugrein, ið verður nevnd í útoyggjaálitinum sum ein møguleiki til at skapa vinnulív í útoyggj.

# Mugu umhugsa at verja summi øki fyri verkfalli

**Bjarni Djurholm er framvegis sinnaður at taka spurningin upp um at gera reglar fyri at tað í vissum førum ikki skal bera til at leggja aling og djórahald lamið í verkføllum**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Aki Bertholdsen*

Tá í Føroya Arbeiðarafelag og havnar Arbeiðsmannafelag fóru í verkfall í vár, varð serliga nógv tosað um alivinnuna ð og ikki minst tað, at arbeiðið at basa ILA sjúkuni í Fuinningsfirði, varð tarnað.

Tá vóru røddir frammi um, at reglar áttu at vera settar fyri at friða alivinnuna fyri verkgføllum á arbeiðsmarknaðinum.

Serliga áttu reglar at verða settar í verk, so at arbeiðið á niðurberja sjúkur í alivinnuni í hvussu so er ikki varð tarnað.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, segði tá, at hann fór at reisa spurningin.

Síðani hoyrdist onki aftur.

Landsstýrismaðurin sigur, at onki meiri er hent í málinum. Men hann er framvegis sinnaður at reisa spurningin.

– Vit fara at reisa málið í samband við onkran av teimum fundum, sum vit regluliga hava við vinnuna.

Bjarni Djurholm sigur, tað hevði sera stórar avleiðingar fyri alifelagið í Funningsfirði, at arbeiði at niðurberja ILA sjúkuna varð tarnað, og steðgaði verkfallið ikki akkurat tá ið tað steðgaði, er yvirhøvur ilt at hugsa sær avleiðingarnar av tí.

– Eg fari at reisa spurningin um vit ikki í ávísum førum eiga at seta reglar fyri at friða djórahald yvirhøvur frá verkfallum í ávísum førum.



*– Vit mugu taka spurningin um, um tað ikki er rætt at friða djórahald fyri verkfalli um ein neyðstøða skuldi tikið seg upp, eitt nú um tað er neyðugt at halda arbeiði gangandi fyri at niðurberja sjúku, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

Hann hugsar sostatt ikki bara um aling, men eisini um annað djórahald. Eitt nú neytahald.

Tað, hann hugsar um, er at tað skal bera til at friða djórahald fyri verkfalli í eini neyðstøðu, sum talan var um í Funningsfirði í vár.

Hann sigur, at vit mugu staðfeasta, at í verkfallinum, vórðu fakligar leiðbeiningar frá landsdjóralæknaum í eini neyðstøðu, ikki fylgdar og tað er ein spurningur, vit eiga at viðgera.

– Tað kundi einsvæl verið talan um eina sjúku í einum fjóri, sum tað ikki hevði borið til at niðurbart.

Bjarni Djurholm sigur, at hóast djórahald av ymsum slag, ikki minst alingin, hevur alstóran týdning fyri samfelagsbúskapin, ger hann hetta ikki bara av fíggjarligum orsøkum.

Hetta er ein spurningur, sum vit eiga at viðgera út frá einum djóraetiskum sjónarmiði, sigur hann.

Men hann ásannar eisini, at skal nakað henda á økinum, skulu helst allir partar á arbeiðsmarknaðinum onkusvegna viðurkenna, at hetta er eitt øki í samfelagnum, sum tað tænir øllum pørtum at gera undantøk fyri, um ósemjur stinga seg upp.

Men hann skilir væl um arbeiðarafeløgini fara at uppfata hetta sum eitt inntriv í teirra rættindi at fara í verkfall.

Hvat hendir, um onkrir partar av arbeiðsmarknaðinum seta seg ímóti tí, veit hann ikki.


**MASSAGE**
**1-årig uddannelse**
**(ca. en weekend om måneden)**
Starter: den 25. til 26. august 2001
Sted: Tórshavn
Pris: 1.200 kr./weekend
**Jens Melgaard**
(lærer, massør og afspændingspædagog, DAP
ring efter program tlf. 0045 38 71 72 93




# Eymar upplýsingar leka út



*Loyniligar upplýsingar kunnu leka út, um tú fært W32/Magistr@MM virusið í telduna. Hetta virusið hevur gjørt nógv um seg á internetnum seinastu vikurnar. Mynd: Jens Kristian Vang*

**Telduvirus, sum er í umfari í Føroyum, sendir av sær sjálvum dokument av telduni út til fólk, sum standa í adressubókin. Úrslitið av hesum kann verða sera óheppið fyri føroyskar fyritøkur og virki**

VIRUS
*Eyðun Klakstein*

Eitt herviligt telduvirus, sum er í umfari á internetinum, kann hava við sær serstakliga óhepnar støður fyri føroyskar fyritøkur og virki.

Um virusið, sum gongur undir navninum W32/Magistr@MM, kemur í telduna, tekur tað skjøl, sum liggja á telduni, og sendir tað út til fólk, sum standa í adressubókini í postforitinum.

Hetta ger, at upplýsingar verða sendar fólki, sum einki hava við tær at gera, og er talan um fyritøkur og virki, kunnu eymar upplýsingar skjótt leka út.

## Sendir loynilig skjøl út

Sosialurin hevur fingið eitt teldubræv, sum er sent frá einum føroyskum virki. Í brævinum verður greitt frá einari nýggjari framleiðsluverkætlan, sum virkið ætlar sær í holt við, og fíggarligar upplýsingar, sum hvørki eru ætlaðir blaðnum ella serliga nógvum øðrum fólki, eru í hesum góða brævi.

Tað er ikki virki sjálvt, sum hevur sent teldubrævið út, men virusið, sum er komið í teldurnar á virkinum.

Upplýsingar liggja ikki í einum viðheftum fíli, men í sjálvum tekstrútinum, og tí kunnu øll lesa tær uttan at fáa virusið.

Saman við teldubrævinum er eisini ein annar fílur sendur, og letur tú hendan fílin upp, so verður teldan hjá tær smittað.

## Teldurnar mugu verjast

Í Danmark hava nógvar líknandi hendingar verið seinastu vikurnar, og okkurt sakførarvirkið hevur verið so óheppið at fáa hetta virus. Úrslitið av tí var, at loynilig skjøl vórðu send í umfar á internetinum.

Besta verjan ímóti hesum og øðrum virusum er at hava eitt gott anti-virus forrit, og tað er eisini umráðandi, at hetta forrit er dagførd, so tað kann fáa bilbukt við nýggj sløg av virusi, sum fara í umfar á netinum.

Trupulleikin við hesum virusi er, at tey, sum hava fingið tað, ikki vita av tí, og tí eru fólk og virki í rættiligari hjálparleysari støðu, til onkur ger vart við seg.

# Útskifting í nevndini hjá Kósini



*Nú er ætlaða útskiftingin í nevndini fyri Kósavirkið gjørd*

Tvey nýggj umboð eru nú komin í nevndina fyri Kósavirkið í Klaksvík.

John Rajani og Gloria Kalsø søgdu seg herfyri úr nevndini, og nú er formliga skiftið gjørt.

Hanus Hansen, sum er stjóri hjá JFK, ið eigur Kósavirkið, er komin í nevndina, og hann loysir eisini Meinhard Eliasen av sum formaður.

Adrian Dalsá, sum er stjóri á Kósavirkinum, er somuleiðis komin í nevndina.

**ek**

# Færri næmingar á HF-skúlanum í Klaksvík

**Nú eru aftur tveir flokkar á HF-skúlanum í Klaksvík, eftir at tað hava verið tríggir flokkar seinastu tvey árini. Meginparturin av næmingunum eru framvegis konufólk**

HF
*Eyðun Klakstein*

Mánadagin byrjar skúlagongdin á HF-skúlanum í Klaksvík aftur, og komandi árið verða tað færri næmingar á skúlanum, enn tað hava verið seinastu tvey árini.

Vanliga ganga tveir flokkar á skúlanum, men seinastu tvey árini hava tríggir flokkar verið í skúlanum.

Í summar vóru tveir flokkar lidnir, og tá ein nýggjur flokkur nú er tikin, er tað aftur sum vanligt á skúlanum.

40 næmingar fingu HF-prógv í summar, og tey eru nú burtur. 20 næmingar halda fram í í 2. flokki, og nú byrja 24 nýggir næmingar á skúlanum.

Komandi árið verða tað tí um 44 næmingar á skúlanum aftur ímóti fleiri enn 60 næmingum seinasta skúlaár.

## Mest konufólk

HF-skúlin í Klaksvík lokkar serliga konufólk. Tað eru lutvíst fá mannfólk, sum ganga á skúlanum, og eisini í nýggja flokkinum er støðan tann sama.

Mánadagin byrja 20 konufólk og 4 mannfólk í nýggja flokkinum, og í 2. flokki eru eisini nógv fleiri konufólk enn mannfólk.

Einir 12 lærarar eru knýttir at undirvísingini á HF-skúlanum í Klaksvík, og tað svarar til eini sjey fulltíðarstørv.

HF-skúlin í Klaksvík er í góðum standi, eftir at nógvar umvælingar eru gjørdar seinastu árini. Miðhæddin og ovasta hædd eru sum nýggjar, og telduútgerðin í skúlanum er nýggj.

Næstu tíðina verða onkrar umvælingar gjørdar í niðastu hæddini.


**SUMMARÚTSØLAN**
byrjar
mánadagin 20. august
Øll útsøluvøra -50%


P/F hjá KISSA
Tórsgøta • 100 Tórshavn • Tel. 31 13 95